Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Nøkur minningarorð um

# Ismar Joensen



Tann 30. desember andaðist Ismar Joensen úr Fuglafirði. Ismar gjørdist 84 ára gamal. Um Ismar kundi ein skrivað eina stóra bók, bók um hansara ágrýtni, vitan og um kærleika hansara til fólkið, ið býr í hesum landi.

Ismar var ágrýtin maður at fáa gjørt nakað vinnuligt, tí longu sum 11 ára gamal fór hann at seta sildagørn. Morgunin eftir var nógv sild í, tí hann fekk 11,38 kr. í avrokning, hóast prísurin einans var 8 oyru fyri kilo. Eina aðru ferð drógu hann og ein kammeratur hansara garnið á land. Har var so mikið nógv sild í, at teir fingu 10 kr. í part. Hetta sigur okkum frá hansara ágrýtni frá barni av.

Ismar hevði sera stóran áhuga fyri tí, sum hevði við handil at gera. Hann var einans 15 ára gamal, tá hann fór at arbeiða í handlinum hjá Jóannes Lambaa í Havn. Jóannes var annars ættaður úr Fuglafirði. Ismar dugdi væl at tosa Guds orð, bæði á møtum og manna millum. Hann var ein Harrans tænari burturav.

Eg kom at kenna Ismar til fulnar, tá val var til kommununa í desember 1966. Vit vóru 3, ið komu inn á sama lista. Vit tóku við í januar 1967. Ismar sat annars í bygdaráðnum í 12 ár og var formaður í 3 1/2 ár. Tað var skjótt, at ein legði til merkis, at Ismar legði eina stóra orku í at fáa mál ígjøgnum, sum kundu verða til gleði og gavn fyri bygdina. Eg minnist serliga hansara áhuga fyri at fáa sett Havsild, nú Havsbrún, á stovn. Vit høvdu fleiri fundir við landsstýrið og peningastovnar um ymisk mál og har í millum Havsild. Nakað aftaná fund, har løgmaður Hákun Djurhuus sáli var við, tá segði hann við okkum, at Ismar, hann var ein gløggur maður í samráðingum, tá tað snúði seg um Fuglafjørð. Hann var vælorðaður og sakirnar vóru sera væl undirbygdar.

Ismar var skald og hann var søguríkur maður.

Eg gloymi ongantíð blaðið Ljós á Leiðini, ið hann gav út frá 1945 til 1947.

Landsfelag Pensjónistanna hevur eina andaliga grein í blaðnum Sólsetur við yvirskriftini: Ljós á leiðini. Hana hava vit tikið upp eftir blaðnum hjá Ismari.

Annars so var Ismar uppi í fleiri øðrum málum. Til dømis var hann nevndarlimur í Fuglafjarðar Arbeiðsmannafelag frá 1938 til 1942. Í 1942 var hann formaður felagsins.

Góðu Elsa, Jóannes og Páll, tit hava mist ein góðan mann og pápa, og bygdin og landið ein góðan son.

Men eitt kunnu tit gleða tykkum til í stóru sorg tykkara, tað er at tit øll koma at møta Ismari aftur.

Gev mær tí ofta, Harri,
á lívsins tronga veg
hjá tær ein stillan tíma
at tala bert við teg.
At vera hjá tær, Jesus,
er hjartans djúpa trá,
á foldum og í himli
tín halgidóm at sjá!

Við hesum fáum orðum vil eg lýsa Guds frið yvir minnið um Ismar.

**Símun P. Poulsen**

## Til minnis um

# Randi Heinesen

### f. 23.9.1949 – d. 7.2.2004

*Ein kavaflykra er bráðnað, so hvít*
*so rein hon var*
*til láns vit hana fingu, so burt hon tikin*
*varð.*
*Burt úr vetrarkulda, frá øllum sum*
*nívdi her*
*heima í fjálga staðnum, nú kavaflykran*
*er.*



Sitandi við vindeyga, starandi av kavaflykrunum, ið júst eru farnar at falla og mana góð gomul minni fram, brýtur telefonin tøgnina: Randi er farin.

Settist hond undir kinn og aftur lítandi at teimum lætt leikandi flykrunum rennur Randi – Snow Flakes, tað var júst navnið, vit valdu okkum, tá vit sum 16-17 ára gamlar fóru niðan í Sjónleikarhúsið at syngja, so ungar og óskyldugar, í hvítum stuttum niðurdeilum, hvítum blondublusum, hvítum skóm og við hvítum rósum í hárinum – vit vóru jú kavaflykrur.

Long tíð er liðin síðan tá.

Okkara vegir skiltust, men ongantíð gloymdu vit hvørja aðra, ongantíð gloymdu vit tað dýrabaru tíð vit høvdu á Sjómansheiminum, vit hittust av og á, ringdu til hvørja aðra og tílíkt.

Í 1998 hittust vit so aftur til at syngja. Vit hittust fyrst úti á Argjum hjá Randi, har vit skuldu eitast at venja, men satt at siga gjørdist tað heldur ein hugnaløta við venindusnakki, at hyggja at gomlum myndum og ikki at gloyma døgurðan, sum vit sluppu at velja - panerað flesk og persillusós – sum Randi gjørdi, og sum hon var tikin úr leikum til – hon var jú kokkur á Sjómansheiminum tann tíð tað var, tá vit arbeiddu saman. Sanniliga ein rík tíð. So kom tann stóra løtan, leiðin gekk niðan í Sjónleikarhúsið, har vit skuldu syngja. Har stóðu vit so og kendu okkum sum 16 ára gamlar aftur – sum Snow Flakes.

Í morgun fái eg so boðini – Randi er farin. Sanniliga, skjótt er Harranum um. Ferð eftir ferð vera vit stegðað á, tá vinir í besta aldri verða tiknir frá okkum – ófatuligt.

Randi er farin heim. Vit koma ikki aftur at syngja saman her á jørð. Í dag syngur Randi í tí Himmalska kórinum, har sangurin er brimduni líkur, sum skaldið tekur til.

Fjálgt er at vita, at har skulu vit ein dag aftur syngja saman í tí stóra hvíta skaranum.

Góða Randi, hóast sorgina og saknin kenni eg djúpt takksemi fyri tíðina vit kendust og fyri alt vit høvdu saman.

Í djúpari samkenslu við tykkum øllum, ið hava mist so nógv, lýsi eg við hesum frið yvir minnið um Randi.

**Fríðbjørg**

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara kæri maður og pápi

**Hans Oluf Johannessen**

andaðist mánadagin 1. mars 50 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst seinni í Útvarpinum.

**Jóna, Katrin og John**

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at

**Thorstein Erenbjerg**

andaðist 24. januar í Spania, 49 ára gamal.

Jarðarferðin verður fríggjadagin 5. mars
frá Nakskov kapel

**Anna, Sissal og Tóki**

---

## Dagurin

**3. mars. Húngunn,** deyð í 1003. Føroysk eftirgerð av týska navninum Kunigunde og varð skrivað Kunigunn, tá ið álmanakkin kom á føroyskum. Hon varð gift týska keisaranum Heindriki II og læt byggja bæði kleystur og kirkjur.

Navnið merkir *mæt stríðskvinna.*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tekniski Skúli, Tórshavn:

# Starvsfólk heiðraði á Skúlaheiminum



*Eirikur Ó. Simonsen, lærari á bildeildini, hevði 25 ára starvsdag, Yngva Skaalum, skrivstovukvinna, hevði 30 ára starvsdag, og Arni Clementsen, økisleiðari, hevði 25 ára starvsdag á Tekniska Skúla*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Týsdagin var samkoma á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í Havn í sambandi við at Arni Clementsen, økisleiðari, og Eirikur Simonsen, lærari, høvdu 25 ára starvsdag. Samstundis hevði Yngva Skaalum, skrivstovukvinna, 30 ára starvsdag**

Arni Clementsen og Eirikur Simonsen byrðjaðu báðir sama dag á skúlanum.

Egon Øregaard, stjóri á Tekniska Skúla, helt talu, hann segði m.a. at Arni og Eirikur høvdu hvør á sínum øki verið við í menningini av skúlanum hesi seinastu 25 árini, og at tekniska menningin og framkomna tøknin setur stór krøv til starvsfólkini á skúlanum.

Egon nevndi eisini at Petur Hentze, sum andaðist í fjør, byrjaði eisini 1. januar 1979.

Arni Clementsen er 53 ára gamal, hann er útbúgvin bygningssnikkari og byggifrøðingur. Hann byrjaði sum lærari á timburdeild skúlans 1. januar 1979 og arbeiddi í nógv ár sum lestrarvegleiðari á skúlanum. Hann var við til at fyrireika teknisku assistentútbúgvingina og undirvísti har. Hann var við til at fyrireika og seta í gongd byggiteknikaraútbúgvingina, har hann eisini undirvísti.

Í 2000 byrjaði hann sum økisleiðari, og er hann framhaldandi í hesum starvi.

Arni er giftur Ellu Smith úr Havn, og eiga tey tvey børn.

Eirikur Ó. Simonsen er 52 ára gamal, hann er útbúgvin bilmekanikari og maskinmeistari. Hann varð settur í fast starv sum lærari á bildeild skúlans 1. januar 1979, og hevur hann í mong ár virkað sum leiðandi lærari á bildeildini.

Hann man vera ein av teimum, sum hava størstu vitanina innan framkomna biltøkni í dag.

Eirikur er giftur Sigurlaug, ættað úr Saksun, og eiga tey tvey børn.

Arni og Eirikur fingu gávur handaðar frá skúlastjóranum.

Eisini handaði skúlastjórin blómur til Yngvu Skaalum, skrivstovukvinnu, sum hevði 30. ára starvsdag 1. mars 2004. Fyri fimm árum síðan, tá hon hevði 25 ára starvsdag, var eisini móttøka á skúlanum.



*Egon Øregaard, stjóri á Tekniska Skúla, helt talu fyri starvsfólkunum, sum høvdu rundu starvsdagarnar á skúlanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*